umhvørvisstovan

Sp/F Rumbul
Postbox 1059 Tinghusvegur 47
110 Tórshavn
Føroyar

Argir hin 14. mars 2025
Málsnr.: 24/23403-2
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Katrin Haraldsdóttir Jensen

Við heimild í grein 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, veitir Umhvørvisstovan við hesum

# LOYVI

## at innflyta og selja einnýtisíløt

**Loyvi nummar**
**EB029**

Loyvið fevnir um innflutning og sølu av øli, mineralvatni og lidnum leskidrykkjum í einnýtisíløtum, við teimum treytum, sum eru tilskilaðar niðanfyri

Argir, hin 14. mars 2025

Katrin Haraldsdóttir jensen
Umhvørvisviðgeri

# LOYVI AT SELJA OG FLYTA INN ØL, MINERALVATN OG LIDNAR LESKIDRYKKIR Í EINNÝTSLUÍLØTUM

**Loyvishavari**

Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, umframt umsókn frá 4. oktober 2024 hevur Umhvørvisstovan veitt loyvi til:

| Navn, bústaður, telefon og faks hjá persóni virki, felagi ella stovni:<br><br>Sp/f Rumbul<br>Á Trapputrøðni<br>100 Tóshavn<br>Telefon: +298341929<br>Teldupostur: rumbul@rumbul.fo<br><br>Møgulig beinleiðis telefon og teldupostur hjá ábyrgdarhavandi persóni:<br><br>Rói Ørvarodd<br>Telefon: +298220999<br>Teldupostur: roi@sms.fo |
|---|

**Úrdráttir og íløt**

Loyvið er givið at framleiða, flyta inn og selja teir úrdráttir í teimum íløtum, sum eru nevnd í fylgiskjal 1:

**Treytir**

- Loyvishavari skal halda ásetingarnar í løgtingslóg nr. nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, og tær reglur sum verða gjørdar við heimild í hesi lóg.
- Loyvishavari skal framhaldandi skráseta nøgdina av innfluttum, seldum, móttiknum og avhendaðum íløtum, og skulu hesar upplýsingar saman við yvirliti yvir inn- og útgoldið pant, latast loyvismyndugleikanum árliga, tó fyrstu ferð 3 mánaðir eftir at loyvið er givið.
- Loyvishavari skal tola møguligar broytingar í treytunum, um eftirlitsmyndugleikin, grundað á serliga tær upplýsingar, ið loyvishavarin hevur skyldu at lata

loyvismyndugleikanum, metir tørv verða á hesum, fyri at pant- og returskipanin skal virka á nøktandi hátt.

**Kunning**

- Avrit av hesum loyvi við atknýttum fylgiskjølum verður latið Tollmyndugleikunum.
- Yvirlit yvir loyvishavarar og úrdráttir verður lagt á heimasíðuna hjá loyvismyndugleikanum.
- Loyvið frítekur ikki loyvishavaran fyri at útvega møgulig onnur loyvi ella góðkenningar, ið kravdar eru sambært aðrari lóg.

**Kæruvegleiðing**

Hendan avgerð kann sambært grein 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, loyvið almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Hjálagt:** **Fylgiskjal 1**
Yvirlit yvir loyvd íløt
**Fylgiskjal 2**
Løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007.
**Fylgiskjal 3**
Kunngerð nr. 54 frá 31. mai 2007 um íløt, úrdráttir og pant.

**Avrit:** Taks, Postrúm 2151, Skálatrøð 20, FO-110 Tórshavn